# Vágsbotnur og hvør fjøl á flot



Teir tríggir bestu í fiskikappingini saman við einum av fyriskiparunum



Aktionarius - alias Jóannaes Andreassen her í fínasta galla á uppboðssøluni í Vágsbotni leygardagin.

Í góðveðrinum leygardagin var nógv virksemi í Vágsbotni frá morgunstundini av. Klokkan 10 løgdu teir 14 bátarnir, ið luttóku í fiskikappingini, sum Lions Club og Tórshavnar bátafelag skipaðu fyri, frá landi, og løtu seinni byrjaðu hini tiltøkini, hjá Lions Club.

Børnini royndu seg sum reiðfólk, stuttleikaðu sær í »Hoppiborgini« ella kappaðust í sleggjusláing, meðan tey vaksnu keyptu sær ein bíligan og góðan døgurða av trolarafiski, fingu sær ein drekkamunn, prátaðu ella gingu sær ein túr framvið bryggjukantinum, hugdu at og mettu um hesar ymisku stuttleikabátarnar, sum vitjaðu henda dagin.

Tá tey frá Lions Club gjørdu søluna upp um kvøldið vóru einar 12-13.000 kr. í kassanum at gera gott við. Sum Sosialurin skilur fer ein góður nevi av avlopinum hesaferð til sluppina Westward Ho, sum tørvar stórar og dýrar umvælingar.

Klokkan fimm komu bátarnir aftur. Hjá bátum, sum royna við snellu, hevur fiskiskapurin verið smáligur um alt landið í seinastuni. Hetta sást eisini á nøgdini teir 14 bátarnir høvud, tilsamans var veiðan 339 kg. ella 24 kg. uppá bátin.

Besti báturin í hesi 145. fiskikappingini var Tight Line við Hans P. Glerfoss. Hann hevði 76,3 kg. Hans Petur fekk sostatt silvurtoskin, sum fyrstu ferð var latin í 1968 í varðveitslu. Harumframt fekk hann steyp til ognar.

Nr. 2 var ANFINNUR við Kára Reynheim og Jóhannes Arne Joensen. Teir høvdu 42,5 kg. uppá mannin.

Nr. 3 var Sølvá við Halli Heinesen. Hann hevði 27 kg. og fekk eins og nr. 1 og 2 styp til ognar.

Fiskurin varð seldur á uppboðssølu, sum Jóans Andreassen skikpaði fyri. Inn komu 5.431 kr. Hesin peningur fer óskerdur til Tórshavnar Bátafelag.

Ein av stuttleikasiglarunum, sum Sosialurin tosaði við, ehlt fyri, at Tórshavnar Bátafelag hevði gjørt eitt gott arbeiði fyri at tað skal vera hugnaligt at koma í Vágsbotn. Nú vóru góð og nosslig hølir har tú hitti fólk, telefon, bað og møguleiki at sleppa av við burturkast. Fyri nøkrum árum síðani var hann farin í land av bátin sínum við tveimum rustposum, men at sleppa av við teir var ikki hugsingur um. Endin var, at hann setti teir við eina stóra læsta ruskbingju, sum stóð niðri á Busatanga. Eitt var, at alt var so nógv høgligari nú, men tað taldi eisini til fyrimunar, at túættiliga merkti, at í Vágsbotni nú var meira atmosfera, at her var livandi umhvørvi, ikki deytt og sterilt. Tó so! Okkurt lýti er, t.d. slitna og viðtikna betongkeiin, og tað at eisini á bryggjukantinum tykist tað sum bilar hava framíhjárætt, framíhjárætt mótvegis bátum.

Rómaborg var sum kunnugt ikki bygt eftir einum degi og siglarin Sosialurin tosaði við, helt at enda fyri, at verða nevndu lýtir beint burtur og Bátafelagið saman við øðrum, s.t.d. leygardagin saman við Lions Club, siglir somu kós, sum seinastu árini, so verður Vágsbotnur ein kveikjandi og savnandi miðdepil fyri báta- og siglihugaði fólk og Havnin fær eitt umhvørvi, sum bæði havnafólk og vitjandi fara at finna fragd í at vitja.

**Axel**



*Høvi varð esini at ríða í Vágsbotni leygardagin*



*Mong børn og vaksin høvdu leitað sær oman í Vágsbotn í góðveðrinum leygardagin.*





*Claymore fer ikki at sigla millum Havnina og Klaksvík á norðoyastevnu*

# Hvørki Smyril ella Claymore á norðoyastevnu

*Í lýsing í útvarpinum í gjár, frá Strandfaraskipum Landsins, varð sagt, at hvørki Smyril ella Claymore fara at sigla til Klaksvíkar á norðoyastevnu. Í staðin ger Dúgvan ein túr til Havnar, eftir róðrarfólki og bátum, og suður aftur um kvøldið. Umframt hetta fer Ternan, við hjálp frá Dúgvuni, at sigla um Leirvíksfjørð*

FRÓÐI LØKSÁGARÐ

Tað eru ikki bara suðuroyingar sum merkja sviðan av at Smyril ikki er tøkur, nú hann er til umvælingar og árligt eftirlit. Nú verður Norðoyarstevnan eisini rakt av hesum.

Vanligt hevur verið nógv tey seinastu árini, at Smyril hevur gjørt ein túr norðoyastevnuaftan úr Havn til Klaksvíkar, og suður aftur um kvøldið, við róðrarfólki og stevnugestum. Vanligt hevur verið at eini áttahundrað ferðafólk hava nýtt henda møguleika.

Í ár vera fleiri av teimum, ið ætla sær á norðoyastevnu snýtt fyri henda møguleika, tí ikki er pláss fyri meiri enn 350 ferðandi umborð á Dúgvuni, sum skal gera henda túrin í ár. Tá øll kappróðrarfólkini eru komin umborð, verður neyvan pláss fyri nógvum ferðafólki afturat.

Uttan Smyril tøkan, og við Claymore, sum hevur minni kapacitet tá talan er um ferðafólk enn Dúgvan, sum avloysaraskipi, hevur verið neyðugt at ganga nýggja leiðir hjá Strandfaraskipum Landsins í ár.

— Vit hava valt at lata Dúgvuna gera ein túr til Havnar eftir kappróðrarfólki og bátum. Onnur, sum ætla sær á norðoyarstevnu, noyðast at ferðast um Leirvíksfjørð við Ternuni, ella við Dúgvuni, sum eisini fer at sigla einstakar túrar um Leirvíksfjørð, sigur Heri Joensen fólkaflutningsleiðari á Stradfararskipum Landsins. Heri Joensen vísur samstundis á, at bussambandið henda dagin verður útbygd soleiðis, at eingin trupulleiki verður at koma aftur og fram.

Tað eru óivað fleiri sum undrast á at Strandaraskip Landsins ikki sendur Claymore ein túr til Klaksvíkar.

— Hetta verður fyrst og fremst gjørt fyri ikki at órógva suðuroyarleiðina, har kapaciteturin ikki er alt ov stórur frammanundan. Umframt hetta, so er Dúgvan góðkend til 350 ferðafólk, ímeðan Claymore bara hevur loyvi at sigla við 300 ferðafólkum, sigur Heri Joensen at enda.

Strandferðslan væntar við hesum broytingum at nøkta tørvin hjá teimum, sum hava hug at fara til Klaksvíkar á norðoyastevnu. So leingi Ternan siglur um Leirvíksfjørð, fara Sam og Ternan I. at røkja ferðasambandið um Vestmannasund. Vit hava eisini fingið eina viðmerking frá NFÍ sum eru við í fyrireikingunum av norðoyastevnuni. Símun av Høvdanum sum situr í nevndini í NFÍ sigur, at teir slett ikki hava hugsað um henda trupulleika, og sum støðan er við skipum hjá strandferðsluni í løtuni, haldu teir at hetta var ein brúkilig loysn. Men tað harmar teir, um fólk setast aftur av hesum.

## Lesarabrøv:

## Bindið frið

Sum ein av teimum mongu í útlegd havi eg fylgt við, hvat fyriferst innan kirkjulívið heima á landi.

Og eg gerist - vit eru fleiri - hørm.

Eg havi lært, ja heilt frá sunnudagsskúlanum, at tað er ikki givið okkum at døma. Matt. 7,1 - Luk. 6,37 - Luk 12,14.

Kirkjan er at fylkjast um, og hevði eg vónað, nú Føroyar halda 1.000 ára dag fyri Kristindómsins komu til landið, at stríðið, sum tíverri hevur verið tey seinastu 10 árini til óbøtandi skaða fyri kirkjuna, nú var niðurlagt.

Til tykkum, sum byrja ár 2.000 við at bera brenni til stíðsbálið, fari eg at siga:

»Bindið frið.«

Alt tað, tit vilja, at menn skulu gera móti tykkum, tað skulu tit gera móti teimum, tí hetta er lógin og profetarnir. Matt. 7,12.

**Sonja á Argjaboða**
**Århus**

## Stuðla teim fýra prestunum

Sum kunnugt hevur stríð tikið seg upp í kirkju okkara, og kirkjufólkið alt harmast um at so er.

Vit kunnu øll verða samd um, at tá gestir koma til landið, so eiga vit øll – eisini prestarnir - at sýna teimum allan blíðskap.

Men tá talan er um ein gest, sum skal prædika í kirkju okkara, hava prestarnir eina ábyrgd, ið vit onnur ikki hava. Teir hava skyldu til at ansa eftir, at eingin fer á prædikustólin sum lærir í stríð við Guds orð.

Og tað er júst hetta sum er hent. Ætlanin var at ein danskur biskupur - sum hevur góðtikið at samkynt paralag kann markerast í kirkjuni - skuldi prædika. Hetta er villeiðandi læra sum eigur at vera bannlýst í kirkjuni.

Okkara prestar, Niels Pauli Danielsen og Hans Eiler Hammer, gjørdu tí tað sum rætt er, at siga nei til at hesin biskupurin fekk loyvi at prædika í Christianskirkjuni.

Vit vilja av fullum huga taka undir við prestum okkara í hesi avgerð, og takka fyri at tit - saman við kirkjuráðnum í Klaksvík - stóðu stinnir í hesi søk. Eisini skal ein tøkk ljóða til Bergur Debes Joensen og Sverra Steinhólm fyri tykkara støðu í hesum máli.

**Nevndirnar í Emmaus**
**KFUM & K Soli**
**Deo Gloria**


